og vit byrja upp á ein andaligan vøkstur við at lesa Orðið, biðja og vera partur av samkomufelagsskapinum. Og tað er líkasum tað, sum Jóhannes sigur: Eg skrivi til tykkara, børn míni, hvørs syndir eru fyrigivnar.

Sum tíðin gongur aktiverast vit meira og meira í tí andaliga lívinum. Vit luttaka bæði í samkomuhøpi og í at liva eitt andaligt lív. Natúrliga gerast vit meira og meira virkin bæði so og so, og vøksturin í okkara andaliga lívi gerst meira og meira sjónligur. Og Jóhannes skrivar til hesi: Eg skrivi til tykkara, tit ungu, tí tit hava virkað á andaliga vígvøllinum. Eg minnist persónliga hvussu mítt fokus ein stóran part av lívinum var at „tæna“ Harranum. Og Jóhannes peikar á hesa menning sum eitt andaligt støði í at vera andaliga ungur.

Men í dag er mítt høvuðsfokus **ikki** á at tæna, hóast tað er stórur partur av mínum lívi. Sangurin „Góðska Guds“ sigur tað so væl: Eg kenni Teg sum pápa, eg kenni Teg sum vin! Og tað tykist sum Jóhannes sigur við tey andaligu vaksnu: Eg skrivi til tykkara, tit fedrar, tí tit kenna Hann!! Eg haldi, at tað at vera andaliga vaksin, snýr seg um at kenna pápa okkara betur og betur. Tað merkir ikki, at vit ikki vitna longur, ella virka í tænastu Harrans, men bara at okkara fokus er „Pápi“ okkara og okkara vinur Jesus; og Heilagi Andin er tann, sum virkar alt hetta fram.

Og so er tað hetta við vakstarmark Kristusar; hvat er tað? Eg kann ikki siga, at eg veit tað, men eg havi eina kenslu av, at vakstarmark Kristusar er at kenna Pápa okkara so væl sum Jesus kendi Pápa Sín. Soleiðis sum vit kenna lív Jesusar frá Evangeliunum, so var tað reyði tráðurin í jarðiska lívi Jesusar: At gera vilja Hansara sum sendi Meg. Serliga er tað Jóhannesar evangliið sum vísir okkum hvussu tætt og inniligt sambandið var millum Faðir og Jesus – sonin. Tí hugsi eg, at vakstarmark Kristusar er at hava sama inniliga samfelag við Faðirin, sum Jesus hevði. Tað er áhugavert tá Filip sigur við Jesus: „Vís okkum Faðirin“, og Jesus so vísir á seg sjálvan. Tí kendu teir Jesus, so kendu teir eisini Faðirin. Og í síðstu bøn Síni fyri Sínum sigur Jesus: Hetta er hitt æviga lív, at tey kenna Teg. Alt lív og virki Jesusar var 100% tengt at Faðirinum í Himli.

Eg skrivi hesi orð, tí eg havi eina kenslu av, at tíðin er nú fyri okkum, at vaksa til fedrar og vera tey, sum kenna Faðirin. Hetta merkir ikki, at eg haldi, at vit ikki kenna Faðirin, men eg veit, at vit kenna ikki Faðirin eins væl og Jesus gjørdi. Og eg haldi, at tað er ein profetisk kensla, at tímin er komin hjá okkum at fara djúpari inn í hetta samfelag við pápa okkara. Ofta virkar tað sum, at Guds lívið er ein trygd fyri okkum viðvíkjandi ævigum bústøðum. Men Pápi okkara bíðar eftir Sínum børnum at vaksa upp til fedrar. Og eg vil eggja Filadelfia: Kom inn í eitt pápa-samfelag við Gud Faðir, djúpari enn vit nakrantíð hava kent áður.

*Tj.*

Filadelfia
„Himmal á jørð“

# Vakstarmark Kristusar

*Ef. 4. 13: inntil vit øll vinna fram til at vera eitt í trúnni á Son Guds og kunnskapinum um Hann, til at vera fullvaksnir menn, til vakstarmark fyllingar Krists.*



Hetta er eitt ofta siterað ørindi og hevur verið nýtt í óteljandi talum og undirvísingum, men eg havi sitið og grundað á, hvat vakstarmark fyllingar Krists, merkir. Tað er natúrligt at undirvísa og tala um andaliga menning og andaligan vøkstur, men hvussu sær tað út, og hvørja ávirkan hevur ein slíkur vøkstur á okkara dagliga lív.

Jóhannes gevur eina góða mynd av hesum vøkstri, tá hann í sínum fyrsta brævi kap. 2 skrivar:

*Eg skrivi til tykkara, børn míni, tí syndir tykkara eru tykkum fyrigivnar…*

*Eg skrivi til tykkara, tit ungu, tí tit hava sigrað hin illa…*

*Eg skrivi til tykkara, tit fedrar, tí tit kenna Hann, sum er frá upphavi…*

Um vit hugsa aftur til tann dagin, tá vit vórðu frelst, so var tað, at vitna um okkara frelsu og hvussu stór náði Hansara var móti okkum, høvuðsfokus í lívinum. Tað er greitt, at tá vit verða frelst, eru vit andaliga at líkna við børn,

# NOVEMBER 2024

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadagur | 1. | Kl. 20.00 | **Heyststevna**<br>Møtivertar: Áshild, Linda og Fríðbjørn<br>Ábyrgd/Leiðari: Mariann<br>Talari: Wayne Simmonds<br>Kaffivertar: Áshild, Linda og Fríðbjørn |
| Leygardagur | 2. | <br>Kl. 19.00 | **Reingerð:** Katy og co.<br>**Heyststevna**<br>Møtivertar: No-omi, Marner og Eyðbjørg<br>Ábyrgd/Leiðari: Anna-May<br>Talari: Wayne Simmonds<br>Kaffivertar: No-omi, Marner og Eyðbjørg |
| Sunnudagur | 3. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Fríðbjørn og Hildibrandur<br>Ábyrgd/Leiðari: Tummas J.<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur I<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Wayne Simmonds<br>Kaffivertar: Fríðbjørn og Hildibrandur |
| Mánadagur | 4. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Mikudagur | 6. | Kl. 10.00 | **Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Leygardagur | 9. | | **Reingerð:** Áshild og co. |
| Sunnudagur | 10. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Eyðbjørg og Áshild<br>Ábyrgd/leiðari: Ása L.<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II<br>Uppvørpa: Ása Elisabeth<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Linda Maiken<br>Talari: Tummas J.<br>Kaffivertar: Eyðbjørg og Áshild |
| Mánadagur | 11. | Kl. 19.00 | **Felagsbøn í Filadelfia**<br>Ábyrgd/leiðari: Regin |
| Mikudagur | 13. | Kl. 10.00<br>Kl. 18.30 | **Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna<br>**Barna- og ungdómsarbeiði**<br>Ábyrgd: Nomi |
| Leygardagur | 16. | | **Reingerð:** Mariann og co. |
| Sunnudagur | 17. | | **Húsið Vón hevur 70 ára hald** |
| Mánadagur | 18. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Ása O. |
| Mikudagur | 20. | Kl. 10.00 | **Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Hósdagur | 21. | Kl. | **Hugnakvøld fyri kvinnur og ungar gentur**<br>Ábyrgd/leiðari: Margreth |
| Leygardagur | 23. | | **Reingerð:** Margreth og co. |
| Sunnudagur | 24. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti við innsavning til húsið**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður<br>Ábyrgd/Leiðari: Ragnar<br>Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur II<br>Uppvørpa: Jóel<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Høgni<br>Talari: Sam<br>Kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður |
| Mánadagur | 25. | Kl. 20.00 | **Lovprísan og forbøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur |
| Mikudagur | 27. | Kl. 10.00<br>Kl. 18.30 | **Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna<br>**Barna- og ungdómsarbeiði við døgurða**<br>Ábyrgd: Nomi |
| Leygardagur | 30. | | **Reingerð:** No-omi og co. |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

